## Vísindavøkan á ferð – bílegg ein granskara!

Nú verður aftur møguleiki at bíleggja ein granskara at koma at halda fyrilestur fyri einum arbeiðsplássi, skúlaflokki ella øðrum kring landið í sambandi við ársins Vísindavøku.

Í 2015 royndu vit fyrstu ferð átakið Vísindavøka á ferð. Tá vóru 45 fyrilestrar umbidnir og hildnir kring landið og næstan 1500 fólk vóru til fyrilestur. Bæði tey, sum skipaðu fyri, og granskararnir, sum vóru á ferð, lótu so væl at, at vit vilja royna hetta aftur.

Vegna Granskingarráðið og stovnarnar bjóða vit tykkum at bíleggja ein granskara at koma at halda fyrilestur ein av døgunum 19. – 29. september. Tað kann bæði vera um dagin og um kvøldið.

Granskarin heldur ein fyrilestur um eitt avtalað evni í 30-45 minuttir og síðani er høvi til spurningar ella kjak.

Treytirnar eru einfaldar: Tann, sum tekur ímóti einum fyrilestrahaldara, skal lýsa við tiltakinum, eitt nú í telduposti til starvsfólk ella limir, á Facebook, við tíðindaskrivi ella lýsing í miðlunum. Tað skal vera ein uppvørpa á staðnum og mikrofon um neyðugt. Tað skal vera pláss fyri, at í minsta lagi 20 fólk kunnu koma til tiltakið. Granskararnir gera hetta sum part av sínum starvi og skulu ikki hava samsýning fyri fyrilesturin.

Avtalur verða gjørdar í tí raðfylgju, sum tað verður bílagt, so tey sum spyrja fyrst, hava fyrsta rætt. Tað ber væl til at biðja um fleiri fyrilestrar til sama stað, gjarna við eini raðfesting av, hvør fyrilestur ynsktur verður. Í fyrsta umfari tilskila vit okkum rætt til bert at játta ein fyrilestur til hvønn, sum bíleggur. Er rúm fyri tí, ber til at fáa fleiri.

Bíleggjast skal áðrenn 5. september á telduposti gransking@gransking.fo. Eftir hetta verður samlaða skráin almannakunngjørd á gransking.fo og á okkara Facebook síðu.

Endamálið er at geva øllum føroyingum møguleika at uppliva part av Vísindavøkuni. Fríggjadagin 30. september verður ársins Vísindavøka við framløgum, framsýningum og tiltøkum í Perluni og Reinsarínum í Tórsgøtu í Tórshavn. Skráin verður almannakunngjørd seinni.

Granskararnir, sum hava játtað at halda fyrilestur, eru:

| | |
|---|---|
| Anfinnur Johansen, Føroyamálsdeildin, Fróðskaparsetrið | "Føroyskir uppkallingarsiðir" |
| Ása Johannesen, Fiskaaling | "Persónleiki hjá rognkelsum" |
| Erland Viberg Joensen, Søvn Landsins | "Arbeiðsfólk og handverkarar fram til 1950-árini – millum mentanar- og samfelagssøgu" |
| Gro Gade Haanes , Sjúkrarøktarfrøðideildin, Fróðskaparsetrið | "Hørsel, syn, og lysforhold hos eldre pasienter i hjemmesykepleien" |
| Gunnvør á Norði, Fiskaaling | "Lúsayngul og smittutrýst" |
| Gunnvør á Norði, Fiskaaling | "Súrevnistrot á gáttarfirðum" |
| Hans Andrias Sølvará, Søgu- og Samfelagsdeildin, Fróðskaparsetrið | "Føroyskur politikkur undir fyrra heimskríggi, millum kavbátar, flutningstrupulleikar og danskan politikk" |
| Helgi D. Michelsen, Søvn Landsins | "Talgild fornfrøði" |

| | |
|---|---|
| Heini W. Rasmussen, Fiskaaling | "Rákmynstur í aliringum" |
| Heri Ziska, Jarðfeingi | "Jarðvísindini handan oljuleiting; fyrireikingar til komandi oljuleitingarútbjóðingarumfør" |
| Janus Hansen, Søvn Landsins | "Vespur í Føroyum" |
| Jákup Reinert Hansen, Søgu- og Samfelagsdeildin, Fróðskaparsetrið | "Tann syngjandi trúbótin" |
| Jim á Horni, Jarðfeingi | "Føroyar sum arktiskt øki" |
| Jóan Pauli Joensen, Søgu- og Samfelagsdeildin, Fróðskaparsetrið | "Í stovuni sofu, í køki komfýr" Føroyski bústaðurin fyrsta part av 20. øld. |
| Jógvan í Lon Jacobsen, Føroyamálsdeildin, Fróðskaparsetrið | "Skateboard, ella rullifjøl ella... Málvariatión" |
| Jógvan í Lon Jacobsen, Føroyamálsdeildin, Fróðskaparsetrið | "Føroyskt – málið í miðjuni" |
| Kristianna Dam, Sjúkrarøktarfrøðideildin, Fróðskaparsetrið | "Hvussu uppliva børn hjá foreldrum, ið eru rakt av sálarsjúku, sína tilveru" |
| Lis Mortensen, Jarðfeingi | "Føroyar ávegis at vera UNESCO-Geopark" |
| Maria Skaalum Petersen, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu | "Gransking innan neurodegenerativar sjúkur í Føroyum" |
| May-Britt Skoradal, Sjúkrarøktarfrøðideildin, Fróðskaparsetrið | "Hvønn týdning hevur fótbóltur á heilsustøðuna hjá fólki við prediabetes" |
| Noomi O. Gregersen, FarGen | "Eru føroysk gen áhugaverd í heilsuhøpi" |
| Pál Weihe, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu | "Dálkingarevni og immunskipanin hjá børnum í Føroyum" |
| Pál Weihe, Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu | "Heilsuárin av grind og spik" - saman við sýning av dokumentarfilminum Grindahvalurin |
| Petra E. Petersen & Jógvan Páll Fjallsbak, Heilsufrøðiliga Starvsstovan | "Eyðmerking av bakterium í sambandi við ræsing av skerpikjøti" |
| Rólvur Djurhuus, Búnaðarstovan | "Gransking og skrásetingar í seyðahaldi í Føroyum" |
| Sólva Eliasen, Havstovan | "Plantuæti kring Føroyar – avmyndað við fylgisveini" |
| Sólva Jacobsen, Havstovan | "Æti og yngul á føroyska landgrunninum" |
| Turið Sigurðardóttir, Føroyamálsdeildin, Fróðskaparsetrið | "Ungmannafeløginini og teirra týdningur fyri mentanarmenningina" |
| William Smith, Landssjúkrahúsið | "Leysasøgur og sannroyndir um smittu og smittuspjaðing " |

*Onkur granskari er ikki tøkur allar dagarnar. Hetta kunna vit um, so hvørt fyrispurningar koma. Fyrivarni verður tikið fyri broytingum - annaðhvørt um onkur fær forfall ella um fleiri koma afturat.*